# 1. deild eitur nú Formuladeildin

**Fótbóltssamband Føroya hevur gjørt stuðulsavtalu við KT-fyritøkuna Formula.fo um at verða høvuðsstuðul hjá fremstu deildini í mansfótbólti. Tískil er nú einki, sum eitur 1. deild, men ístaðin er komin Formuladeildin**




*Tvær ferðir Holm, Torkil og Óli, taka lógvatak. Formula.fo er nú høvuðsstuðul fyri bestu fótbóltsdeildina í landinum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

FORMULADEILDIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Á tíðindafundi í FSF-húsinum mikumorgunin bleiv stuðulsavtala millum Fótbóltssambandið og Formula.fo undirskrivað. Avtalan inniber, at gamla 1. deildin í mansfótbólti nú eitur Formuladeildin.

### Báðir partar fegnir um avtaluna

Tað vóru teir báðir Óli Holm og Torkil Holm Petersen, ið vegna ávíkavist FSF og Formula.fo, undirskrivaðu avtaluna, sum í fyrstu atløgu er galdandi fyri hetta kappingarárið.

Báðir partar søgdu, at teir vóru fegnir um avtaluna. Formaðurin í FSF, Óli Holm, segði á tíðindafundinum, at Fótbóltssambandið hevði arbeitt við málinum í umleið eitt hálvt ár. Hugskotið til at fáa ein høvuðsstuðul til fremstu deildina, hevur FSF fingið úr okkara grannalondum, har tað er púra vanligt, at landskappingarnar hava ein høvuðsstuðul. Til dømis eitur tað jú SAS-ligain í Danmark, Landsbankadeildin í Íslandi og Tippeligain í Noreg.

### Formula hevur sum ábyrgd at stuðla

Forstjórin hjá Formula.fo, Torkil Holm Petersen, segði, at KT-fyritøkan var sera fegin um, at tað var hon, ið gjørdist fyrsti høvuðsstuðulin hjá fremstu deildini í føroyskum mansfótbólti.

Torkil Holm Petersen greiddi frá, at tað ofta verður spurt, um fyritøkur fáa nakað aftur fyri stuðulin. Eftir hansara tykki er tað ikki tað mest týdningarmikla, tí ein fyritøka sum Formula.fo hevur sum ábyrgd at stuðla ítróttinum í ávísan mun.

Torkil Holm Petersen segði eisini, at Formula.fo ikki hevur sett FSF nakrar treytir fyri, hvussu stuðulspeningurin skal býtast, tí eftir hansara tykki hevur Fótbóltssambandið betur førleika til at gera hetta.

### Feløgini fáa sín part av pengunum

Óli Holm, formaður í Fótbóltssambandinum, var sera fegin um, at tað hevur eydnast FSF at fáa ein høvuðsstuðul til kappingina.

Spurdur hvussu stuðulspeningurin verður nýttur, segði Óli Holm: - Feløgini í 1. deild fáa sjálvsagt sín part av pengunum. Nakað skal eisini nýtast til leikaramenningina hjá FSF, men enn er endaliga býtið ikki gjørt.

Fyri einum ári síðani gjørdi HSF líkandi avtalu um fremstu deildirnar hjá kvinnum og monnum, men HSF rendi seg í ávísar trupulleikar, tí tað hevur víst seg, at luftmiðlarnir treyðugt vilja nýta nýggju heitinum hjá teimum báðum kappingunum. Hetta sama kann fara at gera seg galdandi í sambandi við fótbóltin, men Óli Holm sigur, at FSF ætlar sær at fara á fund við stjóran fyri ÚF og SVF, soleiðis at hetta kemur í rættlag.

Hóast 1. deild nú kemur at eita Formuladeildin, so verður ikki gjørt sum í hondbóltinum, har fyrrverandi 2. deild nú eitur 1. deild. Í fótbóltinum verður 2. deild verandi 2. deild.

# Styrkisroyndir á skránni

**KÍ, HB, B36 og NSÍ verða øll mett millum liðini, sum kunnu gera seg galdandi. Longu fyrsta umfarið fæst ein ábending á, hvussu tey eru fyri, nú álvarin aftur er í bóltspælinum**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Fyri ein ítróttarskrivara kann tað vera eitt sindur møtumikið, at fótbóltslandskappingin byrjar um høgtíðina. Serstakliga tí hetta ger tað at kalla vónleyst at hava eina feska upptakt til ymsu liðini, sum skulu í eldin annan páskadag.

Í so máta kundi tað verið ynskiligt, at fyrstu dystirnir vórðu spældir skírisdag, men tá vildi talan helst verið um hálvgum ræstar dystarfrásagnir, tá næsti útgávudagurin er um knappa viku, so alt í alt fær tað helst ikki verið øðrvísi enn tað sama.

Hinvegin verður lesarin ikki snýttur fyri fótbóltsskriving um høgtíðina, tí í blaðnum í dag er stóra fótbóltsblaðið hjá Sosialinum, sum vit í dag geva út sjeynda árið á rað.

### Brak í Klaksvík

Fyri fyrstu ferð verður fótbóltslandskappingin í bestu deildini – sum nú eitur Formula-deildin - í ár leikt yvir 27 umfør, og longu í tí fyrsta av hesum eru tvær styrkisroyndir, sum tykjast serstakliga áhugaverdar.

Ikki minst kann talan gerast um ordans brak í Klaksvík, har javnaldrarnir báðir, KÍ og HB, fara at takast. Seinnu árini hevur HB havt munin, og ikki minst man tað níva í Klaksvík, at HB nú skal roknast sum mest vinnandi felag í landinum.

Seinasta vikuskifti vunnu bæði liðini seg víðari í steypakappingini, og hjá HB mundi sjálvsálitið fáa eitt lop rætta vegin, tá teir uppiborið vunnu á NSÍ. Hinvegin ber illa til at nýta 7-1 sigurin á Fram sum nakað mát fyri styrkina hjá KÍ í ár. Hinvegin kunnu klaksvíkingarnir líta aftur á KÍ-kappingina fyrr í mánaðinum, har teir vunnu 4-1 á HB. Tann dystin varð sagt, at spælið hjá KÍ var á eini heilt, heilt góðari leið, og so er spurningurin, um teir megna at finna tað spælið framaftur.

NSÍ sýndi til tíðir veikleikar, tá teir vitjaðu HB farna sunnudag, og hesaferð skulu teir so aftur í Gundadal. Hesaferð móti B36.

Í árstalsfelagnum hava teir í ár enn einaferð styrkt sær um liðið, og vónin er heilt greitt, at silvurið frá í fjør skal skifast um við gull í ár. Sigurin á Skála í steypakappingini bar boð um, at liðið er við at vera væl fyri, og megna teir at leggja fyri við einum sigri á NSÍ, sær kanska slettis ikki so galið út, hóast tað framvegis eru 26 dystir eftir tað at spæla.

### TB sum ókendur faktorur

Í Vági verður endurtøka av 1/8-finaluni í steypakappingini, tá ÍF kemur á vitjan. Sunnudain vann ÍF tepran sigur vesturi á Eiðinum, og verður úrtøkan hin sama hesaferð, er einki at ivast í, at teir eru væl nøgdir.

Í Gøtu hevur EB/Streymur staðið seg væl seinnu árini. Teir eru tó skerdir av leikbanninum, sum Marni Djurhuus hevur, eftir at hann fekk reytt kort seinasta vikuskiftið. Gøtumenn hava seinnu árini lagt dent á at byggja eitt nýtt lið upp, og so verður spennandi at siggja, hvønn íblástur Sámal Joensen og Magni Jarnskor kunnu geva ungu monnunum.

Seinasti dysturin verður á Skála, har heimaliðið má roknast sum stórfavorittur, nú TB kemur á vitjan. Hinvegin kann TB yvirraska í ár, tí liðið hevur fleiri ókendar faktorar. Ikki minst verður spennandi at vita, í hvønn mun nýggju útlendingarnir fara at styrkja um liðið.